Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



Nr. 199 - 21. oktober 2003 Sosialurin 13

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



S & K-felagið:

# 30 ára stovningardag við móttøku



*Tey, sum í dag manna nevndina í S & K-felagnum, eru: Pætur Niclasen, formaður, Jan Nielsen, næstformaður, Emy Niclasen, Sunrid Johannesen og Eyðgerð Jonhardsdóttir*

*Mynd: Maria Olsen*



*Ruth og Gunleif Johansen. Gunleif var ein av fyrstu nevndarlimunum í S & K-felagnum*

*Mynd: Maria Olsen*



*Nógvar blómur og gávur vóru handaðar. Her er tað Ruth Johansen, sum handar formanninum blómur*

*Mynd: Maria Olsen*



*Finn Nielsen, stjóri í Føroya Keypsamtøku, og formaðurin í S & K-felagnum, Pætur Niclasen.*

*Mynd: Maria Olsen*



*Onnur fakfelagsfólk stukku eisini inn á gólvið hendan dagin*

*Mynd: Maria Olsen*

**Fríggjadagin 17. oktober helt S & K-felagið sín 30 ára stovningardag, og vildi felagið gjarna hátíðarhalda henda dag við eini móttøku í nýumvældu húsum felagsins á Traðarvegi 20 í Havn**

Felagið fyri skrivstovu og krambúðarfólk, S & K, bleiv stovnað 18. oktober 1973. Áðrenn tað høvdu fólk sum arbeiddu á skrivstovu og í handli ikki havt nakað fakfelag. Tey fyrstu í nevndini vóru: Jákup Lamhauge, formaður, Anna M. Christiansen, Sunnvá Zachariasen, Hans Petur Joensen og Gunleif Johansen.

S & K-felagið bleiv væl móttikið, og skjótt hevði felagið yvir 200 limir. Limatalið hevur verið eitt sindur skiftandi upp gjøgnum árini, men seinastu árini hevur felagið tó haft ein støðugan vøkstur, soleiðis at limatalið í dag liggum millum 700 - 800 limir.

Arbeiðið hjá nevndini hesi seinastu árini, hevur alla tíðina verið at styrkja og menna felagið, við m.a eini eftirlønarskipan og einari lívstryggingarskipan sum arbeiðsgevarnir gjalda fyri.

Nevndin í S & K-felagnum fer framhaldandi at arbeiða fyri at betra um sáttmálaviðurskiftini og arbeiðskor limanna.

Til móttøkuna fríggjadagin komu, umframt limir felagsins, fólk frá ymiskum fakfeløgum, arbeiðsgevarar og umboð fyri fyritøkur sum hava limir í S & K.

Ein av fyrstu nevndarlimunum, Gunleif Johansen, møtti eisini hendan dagin.

Tey, sum í dag manna nevndina eru:

Pætur Niclasen, formaður, Jan Nielsen, næstformaður, Emy Niclasen, Sunrid Johannesen og Eyðgerð Jonhardsdóttir.



## Kurt Dal-Christiansen

**f. 5. oktober 1947**
**d. 16. oktober 2003**

Hósdagin 16. oktober andaðist Kurt Dal-Christiansen í Havn, 56 ára gamal. Kurt var føddur í Keypmannahavn 5. oktober 1947. Saman við beiggjanum Per bleiv hann sum smádrongdur ættleiddur av føroysku foreldrunum Annu og Arnold Dal-Christiansen í Havn. Anna (1911-1999) var dóttir Anettu, f. Andersen, ættað úr Noregi, og Hans Joensen keypmann í Havn, og Arnold (1912-1997) var sonur Linu, f. Dal-Christiansen, og Sophus Christiansen, skómakara, í Havn.

Kurt byrjaði sum ungur at arbeiða uppá bilar, og hevði hann stóran áhuga í hesum faki. Enn eru tað fleiri sum minnast hansara snøggu Rambler kassabilar. Hann lærdi til bilmekanikara hjá Jóhannes Berg í Havn. Hansara sergrein innan bilar bleiv upprætting av buglum og lakkering, sum hann var sera dugnaligur til. Hann varð kendur fyri at gera gott arbeiði og fyri at duga væl at blanda lakk til bilar. Tá bilverkstøð kring landið høvdu trupulleikar við at at fáa lakkið at líkjast, vóru boð eftir Kurt. Um hann t.d. fekk eitt bensindeksil í sama liti sum bilurin, var tað bert ein lítil løta, til rætti liturin varð funnin. Hetta var áðrenn bilverkstøðini sjálvi fingu tól at blanda lakk við.

Kurt arbeiddi á ymiskum bilverkstøðum, sum t.d. hjá Carlo Petersen, sum hevði bilverkstað í Torfinsgøtu, Reyni Service í Hoyvík, Jonhard Brøðraberg í Gundadali og hjá Ivan Johansen við Hoyvíksvegin.

Fyrst í 90-unum hevði hann egnan bilverkstað við Smyrilsvegin í Havn, til hann mátti gevast vegna sjúku fyri umleið 10 árum síðan.

Seinnu árini hevur Kurt búð á Røktardeildini á Landssjúkrahúsinum. Kurt átti dóttrina Eilis, sum býr og í Vejle, og abbasynirnar Marcus og Mathias.

## Dagurin

**21. oktober. 11000 moyggjar.** Halgisøgurnar siga frá, at ein kongsdóttir úr Bretagne, Ursula av navnið, varð trúlovað einum enskum kongssyni. Tey gera av at hittast í Køln, men fyrst skal hon gera pílagrímsferð til Róm. Hon fer avstað og henni fylgja 11000 moyggjar, men hetta talið er helst skrivað skeivt fyri 11. Tá ið tær skulu fara til Køln, legði ein heiðin skari av Húnalondum eftir teimum, og teir neyðtóku tær og drupu tær. Í fyrsta umfari var Ursula spard, men tá ið hon ikki vildi lovast heidna húnakonginum, fekk hon somu lagnu.

*A.C. Evensen doyði hendan dagin í 1917.*